VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi, seinnapartin minni vindur av norði. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitalagið millum ÷3 stig og frostmarkið.



Veðrið hósdagin:
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum frostmarkið og +3 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Gul til stívt andøvsgul av eystri, seinnapartin upp í ein strúk av landsynningi. Møguliga vátakavi ella regn eitt skifti og hitin millum 2 og 5 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin minkar hann vindin niður í lot av landsynningi, men sunnudagin veksur hann vindin upp í hvassan vind. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 3 og 7 stig.

DAGSINS FØROYINGUR

»Mær dámar væl kava«

39 ára gamli Kenneth B. Olsen í Havn er útlærdur byggifrøðingur og hevur starvast hálvtfimta ár í Havnar Timburhandli sum sølumaður. Frítíðina nýtir hann m.a. í bátinum og saman við HB-fjepparunum

Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

– Kenneth B. Olsen er HB'ari við stórum H. – Í ár vinna vit alt, sigur hann, bjartskygdur
Mynd: Jens Kristian Vang

■ Er nógv at gera sum sølumaður í Timburhandlinum?

– Ja, tað kanst tú ætla. Tað er ein øgilig bygging í gongd í løtuni, serliga í Hoyvíkshaganum, men eisini kring alt landið. Vit í Timburhandlinum hava latið nógv tilboð til fólk, sum ætla at byggja í Hoyvíkshaganum, og hava fingið rættiliga nógv av teimum.

■ Hvat ger tú í frítíðini?

– Eg havi akkurát keypt mær eitt áttamannafar, so tað fer nógv tíð til tað. Men annars er tað HB. Eg eri ein av trúføstu fjepparum teirra, og eri við til allar dystirnar.

■ Hvussu fer HB at standa seg í ár?

– Í ár vinna vit báðar kappingarnar – bæði Føroyameistaraheitið og Løgmanssteypið.

■ Hvat dámar tær kava?

– Mær dámar kava sera væl. Eg búgvi so væl fyri, at stutt er til stóra bøin við KFUK. Tá kavi er brúki eg nógva tíð saman við dóttrini í KFUK-bønum, her vit bæði skreiða, gera kavamann og mangt annað. Tað er ordiliga skeg.

■ Hvørjum vil tú heilsa?

– Eg fari vit á ta stóru byggimessuna Byggeri 06 mikukvøldið, saman við hinum 80 luttakarunum. So eg vil fegin heilsa konu og børnum, – og annars øllum HB-fjepparum. Roynið nú og rópi hart á okkara lið í summar

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-7
Nuuk	1
Qaqortoq	5
Ammassalik	-2
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	5
Seyðisfjørður	-2
Tórshavn	4
Lerwick	5
Aberdeen	6
London	8
Tromsø	--
Bergen	5
Oslo	--
Stokkhólm	2
Keypmannah.	3
Helsinki	-5
Moskva	-2
Berlin	0
Warzawa	0
Kiev	1
Bukarest	--
Paris	9
Madrid	12
Róm	--
Malorca	17
Athen	14
Malta	--
Tunis	20
Beijing	14
New Dehli	29
Bangkok	35
Jakarta	29
Sydney	--
New York	5
Miami	24
Los Angeles	13
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	11
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	25

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt hátrýst, 1049 hPa. yvir Eystur-Grønlandi viknar nakað. Eitt lágtrýst, 1002 hPa. sunnan fyri Lofoten fer spakuliga suðureftir og grynnist.



Í dag:
Lágtrýstið við Suður-Noreg fer suðureftir og grynnist. Lágtrýstið við Hebridurnar fer spakuliga eystureftir.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 20/3 kl. 06^{00}– 21/3. 06^{00}. Hitin í gjár: -3,0°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,2 mm – mált frá 20/3 kl. 06^{00}– 21/3 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í mars: 52,1 mm

VESTFALLSKYRRINDI

13. mars	Mánin longst frá jørðini
14. mars	Fullmáni
22. mars	Seinna kvarter
28. mars	Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
21. Mars	10.51	23.31	09.51	22.31	10.06	22.46	00.27	12.51	01.27	13.51	09.06	21.46	08.06	20.46	11.06	23.46	-	12.06	10.36	23.16	11.51	-
22. Mars	11.42	-	10.42	23.53	10.57	-	01.31	13.42	02.31	14.42	09.57	23.08	08.57	22.08	11.57	-	00.46	12.57	11.27	-	00.31	12.42
23. Mars	00.53	13.34	-	12.34	00.08	12.49	02.53	15.34	03.53	16.34	11.49	-	10.49	23.16	01.08	13.49	02.08	14.49	00.38	13.19	01.53	14.34
24. Mars	02.01	14.29	01.01	13.29	01.16	13.44	04.01	16.29	05.01	17.29	00.16	12.44	11.44	-	02.16	14.44	03.16	15.44	01.46	14.14	03.01	15.29
25. Mars	02.56	15.23	01.56	14.23	02.11	14.38	04.56	17.23	05.56	18.23	01.11	13.38	00.11	12.38	03.11	15.38	04.11	16.38	02.41	15.08	03.56	16.23

GEVIÐ BLÓÐ

Vika 11 – 18. mars
Vinnaratøl: **12 - 24 - 28 - 31 - 33 - 35 - 36**

Eykatøl: **01 - 15**

7 vinnaratøl:	**3.147.033,- kr.**
6 vinnarat.+ eykatal:	**87.177,- kr.**
6 vinnaratøl	**4.286,- kr.**
5 vinnaratøl:	**173,- kr.**
4 vinnaratøl:	**49,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

Vika 11 – 18 . mars
Jokaratal: **5 - 1 - 0 - 1 - 6 - 7 - 3**

Øll 7 røtt:	**12.852.574,- kr.**
6 aftastu røtt:	**325.006,- Kr.**
5 aftastu røtt:	**23.242,- kr.**
4 aftastu røtt:	**2.266,- kr.**
3 aftastu røtt:	**240,- kr.**
2 aftastu røtt:	**49,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

TIPS 13 úrslit
Vika 11 – 18. mars

1.	West Bromwich - Man. U	**2**
2.	Arsenal - Charlton	**1**
3.	Blackburn - Middlesbrough	**1**
4.	West Ham - Portsmouth	**2**
5.	Bolton - Sunderland	**1**
6.	Manchester C - Wigan	**2**
7.	Reading - Wolverhampton	**x**
8.	Norwich - Sheffield U	**1**
9.	Wolverhampton - Cardiff	**x**
10.	Crystal Palace - Ipswich	**x**
11.	Sheffield W - Preston	**1**
12.	Luton - Derby	**1**
13.	Stoke - Burnley	**1**

Prognosa:

13 røtt:	**25.306,- kr.**
12 røtt:	**622,- kr.**
11 røtt:	**61,- kr.**
10 røtt:	**18,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

5 707265 100036 >